Stjørnan-VB 29-22 (12-9):

# Stjørnan svaraði aftur

**Ringa vikuskiftið hjá VB byrjaði, tá tær leygardagin vitjaðu í Klaksvík**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Kvinnurnar hjá VB máttu um vikuskiftið ásanna, at tær ikki eru heilt so nær avgjørda oddinum.

Leygardagin vitjaðu tær í Klaksvík, har Stjørnan skuldi reisa seg eftir ósigurin móti Kyndli. Og tað gjørdu tær eisini. Snøgt sagt, so var Stjørnan í minsta lagi ein flokk omanfyri VB, har Daiva Toumaite enn einaferð tóktist sera einsamøll.

Ikki minst spældi Una Olsen ein branddyst í verjuni, soleiðis at VB ongantíð fekk møguleika at koma inn í dystin. Við trygga sigrinum undirstrikaði Stjørnan, at tær ikki ætla sær fleiri úrslit av slagnum, sum tær upplivdu móti Kyndli. VB byrjaði hinvegin eitt trupult vikuskifti á ringast hugsandi hátt.

**Fakta um dystin**

**Stjørnan-VB 29-22 (12-9)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Joan M. Djordjevic 6(1), Alina Olaru 6(3), Katarina Stepanov 5, Bára S. Klakstein 3, Anna Kristina Samson 3, Louisa Andreasen 2, Maria við Neyst 2, Una Olsen 2
**VB:** Daiva Toumaite 11(7), Laila Jespersen 5, Rannvá Augustinussen 2, Margreth Augustinussen 1, Maryna Zhylko 1, Gurið Mortensen 1, Kristina Holm 1
**Brotskøst:** Stjørnan 6, VB 7
**Útvísingar:** Stjørnan 1, VB 2
**Dómarar:** Hallur Danielsen & Petur Skeel

StÍF-Søljan 18-19 (9-13):

# Søljan bjargaði stigunum

**Eftir ein lakan fyrra hálvleik, tóktist StÍF hava fingið takið - men tær mistu kortini**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Tað tóktist vera ein styrkisroynd um, hvør parturin skal sleppa undan sjeynda plássinum, sum var á skránni á Skála sunnudagin.

Og skal metast eftir hesum, so verður tað StÍF, sum noyðist eina deild niður næsta kappingarár. Men tað er ikki sørt, at strandakvinnurnar munnu iðra seg eftir dystin.

Tí eftir ein fyrra hálvleik, har Søljan sat á tí mesta, fekk StÍF veruliga takið eftir steðgin. Bara fimm minuttir fyri leiklok hevði Søljan bara fingið tr‡ mál allan seinna hálvleik. Og tó at úrtøkan hjá heimaliðnum ikki var so øgiliga nógv meira, so høvdu tær vunnið seg framum.

Men seinastu løtuna koppaði aftur. Søljan fekk hesa løtuna trý mál, og so munaði einsamalla málið hjá StÍF lítið. Stigini fóru av Skála, har spælararnir bara kundu hugsað um, hvat kundi havt verið.

## FAKTA UM DYSTIN

**StÍF-Søljan 18-19 (9-13)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 5(2), Poula D. Olsen 4, Guðrun Ólavsdóttir 3, Malan Petersen 2, Rósa Johansen 2, Ata Gregersen 1, Ninna K. Johansen 1
**Søljan:** Hertha Simonsen 3, Sólja Jóanesdóttir 3, Louisa Niclassen 3, Heidi Maria Akselsen 3, Jana Jacobsen 3, Irdi Mikkelsen 2, Fía Selma Nielsen 2
**Brotskøst:** StÍF 2
**Útvísingar:** StÍF 3, Søljan 5
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karsten Joensen

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 6 | 6 | - | 0 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 2 SÍ | 5 | 4 | - | 1 | 14 | 6 | 8 | 8 |
| 3 TB | 5 | 2 | - | 3 | 9 | 9 | 0 | 4 |
| 4 Mjølnir | 5 | 2 | - | 3 | 7 | 12 | -5 | 4 |
| 5 ÍF | 5 | 1 | - | 4 | 7 | 14 | -7 | 2 |
| 6 KÍF | 6 | 1 | - | 5 | 7 | 16 | -9 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 5 | 5 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 10 |
| 2 SÍ | 4 | 3 | - | 1 | 11 | 5 | 6 | 6 |
| 3 ÍF | 5 | 2 | - | 3 | 10 | 11 | -1 | 4 |
| 4 Mjølnir | 4 | 1 | - | 3 | 6 | 9 | -3 | 2 |
| 5 Nøvan | 4 | 0 | - | 4 | 0 | 12 | -12 | 0 |

## SÍ tók alt í Trongisvági

Tveir dystir vórðu spældir í meistaradeildini hjá kvinnum um vikuskiftið.

Stórur spenningur var um dystin í Trongisvági, har SÍ vitjaði. Og við einum 3-1 staðfestu sørvágskvinnurnar, at tær avgjørt ætla sær heiðursmerki í ár.

TB tók annars fyrsta settið, men so setti SÍ ferð á. Bæði næsta og fjórða settið vunnu tær so ruddiliga, meðan TB var um reppið at taka triðja settið.

Í hinum dysitnum í dag vann KÍF 3-1 á Mjølni. Mjølnir helt seg annars vera komið við í dystin, tá tær vunnu næsta settið, men kollfarðakvinnurnar vildu tað tó øðrvísi.

**mørk**

**Úrslitini**
**Meistaradeild kvinnur**
TB-SÍ 1-3 (25-21, 11-25, 24-26, 14-25)
KÍF-Mjølnir 3-1 (25-.14, 23-25, 25-22, 25-19)

Neistin-StÍF 26-20 (12-10):

# Upphiting hjá Neistanum

Uttan nakað stórvegis hóvasták eydnaðist tað leygardagin hjá Neistakvinnunum at taka øll stigini, tá StÍF vitjaði.

Fyri steðgin var talan kortini ikki um tann heilt stóra munin, men tað mundi standa greitt, at tað var heimaliðið, sum hevði størra yvirskotið.

Og um miðjan seinna hálvleik kom hetta eisini til sjóndar. Úr 16-15 økti heimaliðið í 20-16, og so gjørdist talan ikki aftur um nakran spenning.

**Fakta um dystin**

**Neistin-StÍF 26-20 (12-10)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Annika Thomsen 6, Annika Ljósstein 4(1), Ása á Neystabø 4, Unn Kragesteen 3, Birita Ward-um 2, Nicoleta R. Hansen 2, Gunnvá Brockie 2, Mildrið Jacobsen 1, Kára á Dunga 1, Anna Clementsen 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8(3), Paula B. Høgnesen 4, Poula D. Olsen 3, Ninna K. Johansen 2, Rósa Johansen 1, Elin K. Jacobsen, 1, Sunfríð B. Johansen
**Brotskøst:** Neistin 1, StÍF 3
**Útvísingar:** Neistin 1, StÍF 1
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

**SUNSET KAPPINGIN KVINNUR**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 11 | 9 | - | 0 | - | 2 | 295 | 218 | 77 | 18 |
| 2 Stjørnan | 9 | 8 | - | 0 | - | 1 | 259 | 166 | 93 | 16 |
| 3 Kyndil | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 220 | 215 | 5 | 14 |
| 4 VB | 8 | 5 | - | 0 | - | 3 | 205 | 161 | 44 | 10 |
| 5 VÍF | 11 | 5 | - | 0 | - | 6 | 264 | 264 | 0 | 10 |
| 6 StÍF | 10 | 3 | - | 0 | - | 7 | 228 | 249 | -21 | 6 |
| 7 Søljan | 10 | 2 | - | 0 | - | 8 | 173 | 259 | -86 | 4 |
| 8 Tjaldur | 9 | 0 | - | 0 | - | 9 | 154 | 266 | -112 | 0 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN MENN**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 219 | 192 | 27 | 13 |
| 2 H71 | 8 | 5 | - | 1 | - | 2 | 238 | 191 | 47 | 11 |
| 3 VÍF | 8 | 5 | - | 0 | - | 3 | 228 | 223 | 5 | 10 |
| 4 StÍF | 8 | 4 | - | 0 | - | 4 | 205 | 217 | -12 | 8 |
| 5 KÍF | 8 | 2 | - | 0 | - | 6 | 207 | 232 | -25 | 4 |
| 6 Neistin | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 220 | 262 | -42 | 2 |

i Sosialurin